VÍF kann gerast fremst hjá bá›um

Ein dystur hjá kvinnum og tríggir hjá monnum ver›a leiktir kring landi› í kvøld

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Fult mi›vikuumfar er í kvøld í bestu mansdeildini, og hóast talan ikki er um nakran oddadyst, kann meira enn so vera, at uppger›irnar kunnu gerast áhugaverdar.

Tjaldur illa fyri

Bæ›i mans- og kvinnuli›i› hjá VÍF skulu í eldin í kvøld, og felags fyri bæ›i er, at dysturin hjá teimum ver›ur í Runavík, har Tjaldur tekur ímóti.

Hetta er tó ikki ta› einasta, sum VÍF li›ini hava til felags. Tey eru bæ›i ósigra› higartil í kappingini, og vinna tey bæ›i, eru tey eisini á odda í sínari deild, og hetta er so ikki naka›, sum vestmennningar eru vanir vi›. At bæ›i li›ini eru fremst.

Hetta átti eisini at veri› gjørligt, tí í bá›um førum tykist mótstø›an at vera yvirkomulig. Tjaldur hevur ikki fingi› stig í nakrari av fremstu deildunum higartil, og neyvan ver›ur ta› móti VÍF, at hesi skulu fáast til vega.

Hini mugu fylgja vi›

Í Havn ver›ur grannauppger› millum H71 og Neistan, og hesir hava mangan veri› áhugaverdir. Hoyvíkingar hava kanska ikki havt somu styrki í fjør og í ár, sum teir á›ur hava havt, men hinvegin eru teir altí› stri›shuga›ir, og ikki minst, tá talan er um dyst móti Neistanum.

KÍF skelka›i Kyndil um vikuskifti›, og nú skulu Vagnur og teir so royna seg á Skála

Á pappírinum er Neisin tó favorittur, og ein sigur er eisini ney›ugur, um teir skulu krøkja seg upp móti oddali›unum.

Seiansti dysturin mikukvøldi› ver›ur á Skála, har StÍF tekur móti KÍF. Strandingarnir vunnu sunnudagin t‡dningarmikla dystin á Neistanum, og helst ætla teir sær eisini at fáa stig frá KÍF. Har umframt er ivaleyst eisini stórur spenningur á Skála um, hvørt leikandi venjarin er førur fyri at spæla í dystinum. Hann var ikki vi› móti Neistanum, men ætla›i at royna seg í kvøld.

Kollfir›ingar eru tó ikki longur nøkur løtt uppgáva, men tykjast hinvegin at vera ávegis úr aldudalinum, sum teir hava veri› í. Seinast var› hetta sta›fest í Vestmanna, har kyndilsmenn vóru fegnir um anna› stigi›, so strandingar eru ávara›ir.

Karmarnir hava altjó›a stø›i

Bæ›i í Brøndby, har heimali›i› leg›i seg á odda í superliguni, og í Silkelborg, vór›u ásko›arapláss á altjó›a stø›i tikin í n‡tslu sunnudagin

Hjá fótbóltsfeløgunum ræ›ur ta› um at vinna nógvar pengar. Um ta› eydnast, so eru fyritreytirnar betur at fáa fatur á bestu spælarnum. Eydnast ta› ver›ur møguleikin størri at vinna fleiri dystir, og so rullar myllan rætta vegin.

Um ta› skal eydnast at fáa fatur á ásko›arunum og vinnulívinum, so skulu umstø›urnar vera gó›ar. Ta› hava fleiri fingi› eyga á í Føroyum og nógva a›ra sta›ni eisini.

Sunnudagin vóru teir bæ›i í Brøndby og í Silkeborg gla›ir og væl nøgdir, tá teir tóku n‡ggj ásko›arapláss í n‡tslu.

Aljó›a stø›i

Í Brøndby vóru ikki færri enn 28.416 ásko›arar og hugdu at, tá felagi›, sum fram um øll onnur í Danmark tey seinastu tjúgu árini hevur givi› fóltboltinum og kring umstø›unum n‡mótans sni›, tók n‡ggju karmarnar á stadion í n‡tslu. Karmarnir eru so miki› gó›ir, at nú ver›ur ta› eingin trupulleiki hjá Brøndby at spæla stórar Europa Cup dystir á heimavøllinum og ikki í Parkini. Og ta› ver›ur heldur eingin trupulleiki hjá danska landsli›num at spæla í Brøndby, um ta› av onkrari orsøk ikki fer at bera til at spæla í Parkini.

Dysturin sunnudagin var ímóti AB, og hann var sera undirhaldandi. Brøndby vann 4–2, eftir at teir høvdu veri› á odda 2–0, og eftir at AB í fyrsta minuttinum eftir ste›gin hev›i javna› til 2–2. At Martin Johansen hjá AB, sum nú er í nánd av ni›urflytingarstrikuni, var› rikin av vøllinum tí›liga í 2. hálvleiki, gjørdi ikki uppgávuna hjá AB lættari.

Í Silkeborg tóku teir eisini nógv n‡ggj ásko›arapláss í n‡tslu, men har var ikki so nógv at rópa hurrá fyri hjá heimali›num. Fyri Silkeborg og teirra vi›haldsfólk var ta› stórt vónbrot, at ta› ikki fekst meiri burturúr enn málleysur javnleikur, tá botnli›i› úr Haderslev vitja›i. Frammanundan dystinum høvdu gestirnir bara skava› tvey stig saman.

Brøndby sigurin á AB hev›i vi› sær, at Brøndby leg›i seg á odda í superliguni. Har vóru teir í hvussu so er inntil í gjárkvøldi›, tá FCK og FCM spældu í Jyllandi. Um ta› eydna›ist FCM at vinna, so vóru teir aftur oddali›. Um ta› eydna›ist FCK at vinna, so løgdu teir seg upp á sí›una av Brøndby.

Viborg hevur fyrsta partin av kappingini sta›i› seg væl, me›an ta› hevur gingi› strilti› hjá Aab. Viborg hev›i heimavøll, men AaB vann 2–1. Merkisvert var ta›, at Søren Frederiksen, sum eftir ársskifti› fer at spæla vi› Viborg, skora›i anna› av málunum hjá AaB.

jh

ÍSF fingi› n‡ggja heimasí›u

Í eina tí› hevur Ítróttasambandi› havt egna heimasí›u, men sambært ÍSF hevur henda tó ikki virka› eftir ætlan.

Uppl‡singarnir, sum ver›a á n‡ggju sí›uni, eru teir somu, sum vóru at síggja á teirri gomlu, men bygna›urin av sí›uni er heldur ø›rvísi.

Hetta skal tryggja, at ta› gerst lættari og grei›ari at fáa fatur á vi›komandi uppl‡singum, og vónar ÍSF vi› hesum, at tørvurin hjá teimum vitjandi ver›ur betri nøkta›ur.

Ætlanin er annars, at sí›an skal útbyggjast og dagførast stø›ugt, solei›is at hon altí› er »eina vitjan verd«, sum tiki› ver›ur til í tí›indaskrivinum frá ÍSF.

Sí›an finst nú sum á›ur á www.isf.fo.

jm

Kurt hevur sett met

Super Kurt smílist, og ta› gera tey eisini í Sogndal, har tey fegnast um at hava fingi› málkongin í hópin

Hans Fró›i Hansen ver›ur ikki vi›, tá Sogndal seinnapartin í dag fer at spæla um eitt pláss í bestu deildini

NORSKA 1. DEILD
Jóannes Hansen

Tí›in hjá Hans Fró›a Hansen á besta li›num i Sogndal er av. Li›bandsska›in í fótli›num hevur havt vi› sær, at mi›verjin ikki hevur vant saman vi› hinum tær sí›stu vikurnar, og í fyrradagin var› ta› avgjørt, at Hans Fró›i skal vera sjúkramelda›ur í eina viku afturat.

Hetta ber vi› sær, at hann ikki ver›ur á li›num, tá Sogndal í dag fær vitjan av Válerengen, og at hann heldur ikki ver›ur vi›, tá seinni dysturin ver›ur spældur í oslo mikudagin í komandi viku. Hans Fró›i flytir til Føroya í vikuskiftinum. Ta› vil siga, at hann saman vi› ø›rum fótbóltsáhuga›um føroyingum fer at fylgja gongdini í Oslo úr Føroyum.

Kurt søguligur

Julian Johnsson var leikbanna›ur sunnudagin, tá Sogndal í sí›sta landskappingardystinum vann 2-1 á Kjelsås. Julian er tøkur seinnapartin í dag, og ta› fegnast teir í Sogndal um.

Kurt Mørkøre skora›i seinna máli› sunnudagin. Harvi› rakk hann 20 málum í alt í teimum 26 landskappingardystunum (Kurt spældi ikki allar fer›irnar), og ta› er met í Sogndal, me›an li›i› hevur veri› umbo›a› í bestu og næstbestu deildini.

Frammanundan var meti› 19 mál. Meti› átti eingin annar enn Tor Andre Flo, sum í fleiri ár hevur veri› og framvegis er í álopinum hjá Chelsea, har hann hevur skora› eina rúgvu av málum.

Í Sogndal fegnast teir um, at ta› í fjør eydna›ist teimum í felagnum at fáa Kurt Mørkøre at skifta bakingina í Klaksvík um vi› fótböltin í Sogndal. Og ta› er ikki at undrast yvir, tá hugsa› ver›ur um úrtøkuna hjá Kurt Mørkøre og harvi› eisini Sogndal.

Sogndal er í ø›ini

Norska fótbóltssambandi› hevur gjørt av, at seinni uppflytingardysturin skal spælast, me›an tríggir av spælarunum hjá føroyska felagnum í Noregi eru burturí í landsli›sørindum

NORSKA 1. DEILD
Jóannes Hansen

Teir vóru ikki heilt blí›ir í Sogndal í fyrradagin. Orsøkin var, at teir høvdu fingi› at vita frá norska fótbóltssambandinum, at seinni uppflytingardysturin ímóti Válerengen skal spælast mikudagin í komandi viku.

Upprunaliga var ætlanin, at dysturin skuldi spælast komandi leygardag. Men tá ver›ur heimavøllurin hjá Válerengen upptikin. Teir spæla heimadystirnar á tjó›arvøllinum, sum er Ullevaal í Oslo. Har ver›ur steypafinalan hjá kvinnum leygardagin, og so er dysturin millum Válerengen og Sogndal útsettur til mikudagin.

Ta› halda teir í Sogndal líti› um. Orsøkin er, at tríggir av spælarunum hjá Sogndal vera burturí í komandi viku. Talan er um tríggjar ungar spælarar, sum skulu vi› norska U-18 landsli›num, sum í komandi viku skal luttaka í EM undankapping á Azorunum.

– Vit gera eitt gott ungdómsarbei›i. Ta› ger, at spælarar eru nóg gó›ir til at spæla á landsli›num. Lønin er, at fótbóltssambandi› leggur solei›is til rættis, at teir sekta okkum, so vit ikki hava allar spælararnar tøkar, tá vit skulu spæla avgerandi dystin í Oslo. Ta› halda vit líti› um, siga teir í Sogndal.

Teir í fótbóltssambandinum vísa á, at ta› er bara ein av teimum trimum spælarunum, sum plagar at vera á besta li›num hjá Sogndal, men ta› vil felagi› ikki ganga vi› til. Teir vísa á, at í dystinum ímóti Kjelsås sunnudagin vóru allir tríggir á vøllinum. Kristian Ystaas og Veger Skjeldested vóru vi› frá fyrsta bríksli, og Kurt Heggestad kom inn, tá ein hálvur tími var eftir.

Gera nógv burturúr

Í Sogndal eru teir uppsettir. Teir ætla at leggja nógv fyri í dag. Um ta› eydnast at vinna sannførandi sigur, so ver›ur smeiturin av, at ungu menninir ver›a burturstaddir, ikki so stórur mikudagin í komandi viku.

Dysturin ver›ur spældur seinnapartin klokkan 13 føroyska tí›. Á fleiri arbei›splássum í Sogndal og í økinum har rundanum fara tey í dag bara at arbei›a fyrrapartin, og skúlarnar ver›a stongdir á middegi. Alt sn‡r seg um fótbóltsdystin, sum er á skránni klokkan 14 norska tí›. Ta› ver›ur rokna› vi›, at ásko›aratali› í Sogndal í dag ver›ur størri, enn ta› nakrantí› hevur veri› fyrr í ár.

Kurt skora›i

Kurt Mørkøre var einasti føroyski spælarin á Sogndal li›num sunnudagin, tá Kjelsås vitja›i. Julian Johnsson var leikbanna›ur, og Hans Fró›i Hansen var skaddur.

Sogndal var í 4-5-1 útgangsstø›u. Eingin ivi var um, hvat li›i› var meiri sannførandi. Hóast nógv gekk fyri seg á mi›vøllinum, so var heimali›i› greitt omaná. Alexander Ødegaard setti hol á, tá fyrra umfari› var hálvrunni›. Hann skora›i eftir nakrar fer›ir aftur og fram í bortsteiginum.

Kurt Mørkøre var fremsti álopsspælarin hjá Sogndal, og hesa fer› eydna›ist ta› honum at skora. Máli› til 2-0 kom, tá sjey minuttir vóru eftir av fyrra umfarinum. Eftir uppspæl í vinstru og innlegg smekka›i Kurt Mørkøre úr f‡ra metrum upp í nettaki›. Í 2. hálvleiki var h‡rurin á og kring vøllin gó›ur í gó›a heystarve›rinum. Gestirnir pyntta›u um, tá ta› bara var ein lítil løta eftir, men ta› tóktist ikki at taka naka› burtur frá.